# Sjómansprestastarvið – ein kristin kriminalsak

FØROYSKA SJÓMANSPRESTASTARVIÐ

*Essayistur Ólavur Rasmussen*

**3. partur**



Vit trý í nevndini undir landsstýrinum, Kristianna S. Jacobsen, fulltrúði í mentamálaráðnum, Jógvan Fríðriksson, formaður í føroysku sjómanskirkjuni og undirritaði, fóru straks til verka at gera álitið. Samstarvið okkara millum var fyrimyndarligt, og skrivaðu vit eitt álit, sum fekk rós frá politikarunum. Jógvan tók sær av tí søguliga partinum, frá tí at føroyska sjómanskirkjan var stovnað, Kristianna tók sær av tí umsitingarliga partinum, meðan eg tók mær av tí "uttanríkispolitiska" partinum, tí sum hevði við sjómansprestastarvið í útlondum at gera. Tað fall tí í mun lut at hava alt samskiftið við leiðsluna í donsku sjómanskirkjuni, t.v.s. fyrst og fremst Ronald Pedersen, aðalskrivara, men eisini í ávísan mun Claus Harms, formannin í donsku sjómanskirkjuni.

Ronald Pedersen og undirritaðu høvdu hesa tíðina nærum dagligt samband, annaðhvørt gjøgnum telefon ella mail.

Ronald staðfesti straks, at danska sjómanskirkjan ikki bert lá tungt í sjóvnum fíggjarliga, men hevði beinleiðis trupulleikar. Serliga álvarsom var støðan, tí at danska sjómanskirkjan og DKU, Dansk kirke i Udlandet, eftir boðum frá hægri myndugleikum, skuldu leggjast saman, og av tí at sjómanskirkjan var so illa fyri fíggjarliga, stóð hon so veik í hesum samráðingum.

Nú skal eingin gleðast um, at tað gongst øðrum illa, men hetta var júst tað, sum eg hevði bíðað eftir. Ronald var moyrur sum smør; um landsstýrið rindaði umleið eina hálva millión árliga, so skuldu føroyingar fáa eina av teimum donsku sjómanskirkjunum til láns, ókeypis, afturfyri at tann føroyski presturin í ávísan mun gjørdi tænastur fyri donsku sóknini á staðnum, og sjálvandi tók sær donskum sjómonnum. Hetta var ikki annað enn upplagt, tí at flest allir útisiglandi føroyingar eru við donskum skipum. Men eg gjørdi Ronaldi púra greitt, at talan var fyrst og fremst um eitt føroyskt starv, tí at talan var um føroyskar pengar. Hetta tók hann fult og heilt undir við. Men tá visti hvørgin okkara, um rúm fór at verða á føroysku fíggjarlógini til eitt sjómansprestastarv. Tað var heilt klárt, at Ronald var bangin fyri, at landsstýrið, tá ið tað kom til skarpskeringar, ikki fekk politiska undirtøku fyri eini slíkari játtan.

So ein dagin ringdi Ronald. Hetta var fyri at svara einum fyrispurningi hvørja sjómanskirkju danir kundu lata okkum fáa. Jú, tað vóru fyrst og fremst tveir møguleikar, Antwerpen ella Hull, men í princippinum skuldu vit bara siga til, tí so skuldu vit finna eina loysn. Vit trý í nevndini høvdu fingið eina uppgerð yvir skipatítt-leikan tey ymisku støðini í Europa, og sá Hull ógvuliga skilagott út, ti at har var skipaferðslan í støðugari menning.

Aftaná at hava tosað aftur og fram í telefonini um hesar ymisku møguleikar, viðgekk Ronald, at fíggjarliga støðan nú var vorðin so álvarsom, at tað var uppá tal at niðurleggja sjómanskirkjuna í Hull, um ikki pengar komu úr Føroyum. Um orsøkina til, at Hull skuldi niðurleggjast svaraði hann, at danska koloniin har á staðnum var minkað so nógv, og at tey flestu donsku skipini í Humber flógvanum við Hull leiðina eisini løgdu inn longri suðuri í Englandi, har tey kundu fáa vitjan av sjómanskirkjuni. Valdu vit tí at stovna eina føroyska sjómanskirkju í Hull, fór tað ikki at vera nakar trupulleiki yvirhøvur at skapa okkara egna frá botninum av, møguliga í samstarvi við London, har nógv føroysk lesandi vóru. Men sjálvandi skuldi tann føroyski presturin, framvegis í ávísan mun, taka sær av teirri donsku koloniini á staðnum. Àðrenn samtalan endaði spurdi hann, um eg visti nakað um játtanina frá landsstýrinum. Eg segði sum var, at so leingi sum álitið ikki var liðugt, var eingi støða tikin til nakað sum helst.

Vit trý í nevndini byrjaðu alt meiri og meiri at konsentrera okkum um Hull sum ta frægastu loysnina, ikki minst tí at boðini frá Ronald gjørdu tað meira einfalt enn nakra aðrastaðni. Eg fór so niður til Keypmannahavnar á fund við Ronald Pedersen og Claus Harms. Teir endurtóku báðir tveir, at Hull lá púra opið, og at teir høvdu givið meinigheitini í Hull boð um, hvussu vorðið var, at um eingin játtan kom úr Føroyum, so varð framtíðin hjá Hull ivasom.

Eg gjørdi á hesum fundi teimum báðum púra greitt, at talan var also um føroyskar pengar, um vit fingu nakra játtan væl at merkja, og at hetta, so ella so, mátti hava stóran týdning, tá ið presturin skuldi setast. Hesum vóru teir eisini fullkomiliga samdir við mær í. Eg spurdi teir so, hvussu teir kundu hugsa sær, at proseduran bleiv, tí eg visti frammanundan, at danska sjómanskirkjan, tá ið tað snýr seg um starvssetanir av sjómansprestum, hevur hægri myndugleika enn vanlig kirkjuráð, tí at meðan kirkjuráðini gera innstillingar, hevur danska sjómanskirkjan suverenan rætt at seta tann, hon vil. Teir vóru eitt sindir ógreiðir at svara, men sluppu ikki so lætt. Eftir at hava kroyst teir, søgdu báðir tveir, at sjálvandi skuldi nevndin í føroysku sjómanskirkjuni undir hesum serstøku viðurskiftum hava tað avgerandi orðið at siga, um umsøkjarin hevði tann neyðuga opinleikan at virka sum sjómansprestur. Var nakað ivamál, bleiv eingin avgerð tikin yvir høvdið á føroysku nevndini. Síðan samdust vit um at mannagongdin kundi útgreinast nærri í sáttmálanum við føroysku sjómanskirkjuna, um málið kom so langt.

Eg var væl nøgdur við svarið og fór aftur til Føroyar. Àlitið var endaliga skrivað, og kom spælandi ígjøgnum. Landsstýrið játtaði peningin. Í somu løtu eg ringdi til Ronald og fortaldi honum tey gleðiligu tíðindi, at peningurin var játtaður, var hann sum hamskiftur, ísakaldur. Hann gjørdi mær púra greitt, at hereftir vildi hann bara tosa við nevndina í føroysku sjómanskirkjuni, okkara business var av, sum hann orðarætt málbar seg.

Men eg var fyrireikaður, havi mangan sitið við eitt samráðingarborð, og hevði langt síðan roknað út, at sleiskni lá beint undir húðini á hesum báðum leiðandi donsku kirkjumonnum. So leingi sum pengarnir vóru óvissir vóru teir sum smør, men so skjótt sum peningurin var tøkur, brynjaðu teir seg við stálhandskum, fyri at fáa sum mest burtur úr endaspurtinum.

Nú var bara eftir at orða og undirskriva ein sáttmála við donsku sjómanskirkjuna, so kundi starvið sum sjómansprestur lýsast leyst. Eg bað staðiliga landsstýrið um, at vit sum høvdu gjørt álitið, vóru við til endaligu sáttmálasamráðingar við donsku sjómanskirkjuna, og ávaraði eg líka so staðiliga ímóti nú, beint áðrenn vit hálaðu, at skræða trolið. Vit høvdu øll kort á hondini, tí at danska sjómanskirkjan var veruliga í fíggjarkreppu, meðan DKU lá í yvirhálingsbananum. Men Føroya landsstýri bar seg tíverri undan, og so vóru Kristianna og eg eisini tvingað at leggja kongin.

Men eg ávaraði uppaftur og uppaftur nevndina í føroysku sjómanskirkjuni at hava skálkin bak oyra, tá ið Ronald Pedersen og Claus Harms komu til Føroyar at samráðast um sáttmálan. Serliga bað eg Jógvan halda fast, tí vit høvdu veruliga ein stóran kalva beint undir borði.

Men hvat hendi? Ja, tað er ein søga fyri seg.

(Framhald)

## Projektleiðarar skapa framleidni og vøkstur



**Fyritøkur, har projektleiðsla er í hásæti, eru meira framleidnar og vaksa skjótari, enn gomlu fyritøkurnar uttan projektleiðslu. Seinast í september byrjar eitt nýtt lið av projektleiðarum á Skeiðsdeplinum, og nøkur pláss eru framvegis tøk á liðinum**

TÍÐINDASKRIV

Projektleiðsla ger stóran mun í vinnulívi og í almennari umsiting.

Fyritøkur, har projektleiðsla verður brúkt, eru uml. 60 prosent meira framleidnar (produktivar) enn gomlu fyritøkurnar uttan projektleiðslu. Projektstýrdu fyritøkurnar menna tvær ferðir so nógvar vørur, og tær skapa tríggjar ferðir so nógv arbeiðspláss, sum fyritøkur uttan projektleiðslu. Tað vísir ein kanning hjá danska vinnumálaráðnum.

– Starvsfólk við førleikum innan projektleiðslu skapa stór virði, har tey eru, og tað er ein góð orsøk til, at tey eru eftirspurd á arbeiðsmarknaðinum, sigur Thomas Magnussen, stjóri á Skeiðsdeplinum, ið hevur projektleiðaraútbúgvingina um hendi.

Hann greiðir frá, at útbúgvingin er ætlað leiðarum og øðrum lyklapersónum, ið arbeiða við verkætlanum ella í næstu framtíð fara í gongd við projektarbeiði.

– Gerandisdagurin á flestum fyritøkum og stovnum er í dag fyri stóran part settur saman av verkætlanum ella tvørgangandi arbeiðsbólkum, og tað er ein onnur orsøk til, at projektleiðarar hava høgan kurs á flestum arbeiðsplássum, sigur Thomas Magnussen.

Í seinnu helvt av september byrjar eitt nýtt lið av komandi projektleiðarum á Skeiðsdeplinum, og framvegis ber til at tekna seg til hesa avbjóðandi og mennandi útbúgvingina.

Útbúgvingin fevnir um trý modul, hvørt á tveir dagar, og har fæst m.a. innlit í hesi evni:

- Hvat er góð projektleiðsla, og hvussu verði eg ein góður projektleiðari?
- Projektleiðaraleiklutурin frá a til z
- Hvussu velji eg rætta projektstýringsmodellið?
- Amboð hjá projektleiðarum
- Fellur í teimum ymsu projektstigunum - og hvussu sleppi eg undan fellum?
- Gerð av projektætlan við virksemisyvirliti, tilfeingisyvirliti og tíðarætlan.
- Hvussu tú skapar motivation og áhuga, tá tú skalt byrja eina verkætlan, samanseta og menna ein projektbólk?

Tilmelding til projektleiðaraútbúgvingina fer fram hjá Skeiðsdeplinum við Marknagilsvegin í Havn, tel. 318813. Seinasta freist at melda til er 14. september 2005. Fleiri upplýsingar um útbúgvingina og Skeiðsdepilin eru á www.skeidsdepilin.fo